HOFF STOFF

# – Drotningin hevur eina greiða støðu

**- Margretha drotning hevur havt eina opna, erliga og fólkaliga framferð, og hevur havt greiða støðu til tey kristnu virðini og kristna lívssýnið. Hetta seta vit stóran prís uppá, og vilja vit nú fegin takka tær fyri hetta, segði borgarstjórin í Fuglafirði, Sigurð Simonsen, tá hann beyð teimum kongaligu vælkomin til býin**

HOFF STOFF
*Snorri Brend*


*Vit hava stóra virðing fyri tínum sjónarmiðum, segði Sigurð Simonsen í vælkomurøðu síni. Her heilsar hann uppá Heindrik á stuttu vitjanini í Fuglafirði*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Fuglafjørður:** – Tað er okkara sannføring, at ta tíðina, hennara hátign drotningin hevur sitið við ræðið, hava tygum staðið fram sum ein positiv og stabiliserandi veruleiki, segði borgarstórin, Sigurð Simonsen, tá hann vegna fuglfirðingar fagnaði teimum kongaligu.

Tey komu til býin kl. 14:15 stundisliga, til ein steðg sum einans vardi í slakar 15 min.

Hesa løtuna fingu tey heilsað uppá býráðslimirnar og lurtað eftir taluni hjá borgarstjóranum, - ein tala, sum øll ikki fingu gleði av at hoyra, tí okkurt smávegis kiksaði við tí tøkniliga.

Mary gav sær kortini góðar stundir at heilsa uppá fólk, og eins og aðrastaðni kring landið, so fekk hon í hópatali av blómum – so nógvar, at embætisfólk og onnur máttu hjálpa henni at bera tær.

Onkur hevði eisini givið henni eitt føroyskt og eitt danskt flagg. Og løtu seinni fekk hon eitt sett av fløggum aftrat:

- Hetta skal Frederik hava, segði konan í gleði um, at hon eisini fekk høvið soleiðis at geva teimum kongaligu eina gávu.

### Broytingartíðir

Sigurð Simonsen takkaði í røðu síni fyri, at tey kongaligu eisini vildu vitja Føroyar og hansara bý.

- Hetta er eisini ein klókur og vakur máti at innvíga krúnprinsaparið í tær ábyrgdir og avbjóðingar, sum bíða teimum í framtíðini, segði hann.

Sigurð vísti á, at vit liva í einum heimi sum alla tíðina er í broyting, har ójavnvág og ótryggleiki merkja tilveruna hjá mongum.

– Í okkara heimi merkja vit eisini til hesar tendensir. Hóast vit ikki hava kríggj, so er talan um broytingar í holdningum hjá fólki.

– Eisini innanfyri tað mentanarliga og andaliga umráðið merkjast hesar broytingar, og mangur fremmandur lærdómsvindur rekur inn yvir okkara samfelag, segði hann, og vísti til, at drotningin her hevur staðið sum ein positiv og stabiliserandi veruleiki.

Hann vísti á, at drotningin hevur havt eina opna, erliga og fólkaliga framferð og hevur havt greiða støðu til tey kristnu virðini og kristna lívssýnið.

– Hetta seta vit stóran prís uppá, og vilja vit nú egin takka tær fyri hetta, segði hann.

### Tillukku

Borgarstjórin ynskti eisini Mary og Frederik tillukku við hjúnalagnum og umstøðunum, nú hon ber barn undir belti.

Tey vistu frammanundan at vitjanin í Fuglafirði gjørdist stutt, men hinvegin so beyð hann teimum vælkomnum aftur eina aðru ferð - til ein longri steðg, har ein fær møguleika at tosa og hugna sær saman.

– At enda vil eg ynskja tykkum øllum eina framhaldandi góða ferð kring landið við teirri gomlu føroysku heilsanini "Jesus fylgi tykkum!, segði Sigurð Simonsen.

Tey kongaligu fóru síðani í bilarnar til næsta steðg – Leirvík.

∆

# – Havi leingi glett meg til hetta

**Fuglafjarðar Hornorkestur setti sín serliga dám á móttøkuna, tá tey kongaligu løgdu at á havnalagnum**

HOFF STOFF
*Snorri Brend*

**Fuglafjørður:** Hóast Rannveig var øgiliga spent uppá vitjanina hjá teimum kongaligu, so merktist tað ikki á henni.

Um fáar minuttir skuldi hon spæla við í Fuglafjarðar Hornorkestri, nú tey kongaligu komu á vitjan í bygdini.

Hon hevði kortini einki at óttast fyri, tí tey í hornorkestrinum hava í longri tíð ikki hugsað um annað og hava tí vant nógv fram móti hesi forkunnugu vitjanini.

12 ára Rannveig Gregersen Hansen úr Gøtu spælir kornett í orkestrinum, og helt tað vera ordiliga stuttligt at júst tey skuldu spæla frammanfyri øllum teimum kongaligu.

Tey skuldi spæla nakrar føroyskar sangir og okkurt útlendskt lag hesa stuttu løtuna, ið vitjanin vardi – nøkur løg áðrenn Brimil legði til bryggju við teimum kongaligu og nøkur løg, tá bilarnir við teimum skuldu fara víðari.

– Hetta er eitt satt upplivilsi fyri meg, sigur hon.

Ikki var tíð til meiri tos, tí nú boðaði orkesturleiðarin frá, at tey skuldu stilla upp og spæla fyrsta lagið, nú sjóverjuskipið skuldi leggja at um eina lítla løtu.


*Rannveig hevur spælt kornett í 2 1/2 ár, og sleppur nú at spæla fyri teimum kongaligu. – Hetta er eitt upplivilsi, sigur hon*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# – Eitt eyka pluss

*Floksskrivarin hjá sambandsflokkinum, Helgi Abrahamsen var millum tey, sum tóku ímóti teimum kongaligu á bryggjuni í Fuglafirði, umgyrdur av donskum og føroyskum fløggum*

HOFF STOFF
*Snorri Brend*



**Fuglafjørður:** Hann er sambandsmaður við stórum S. Hann er floksskrivari í Sambandsflokkinum og hann er eisini fuglfirðingur – Helgi Abrahamsen, sum nú er búsitandi á Strondum.

Nú tey kongaligu vitjaðu barndómsbý hansara var hann sjálvandi á bryggjuni og tók ímóti, saman við børnum sínum, sum fegin vildu síggja eina veruliga prinsessu og ein veruligan prins.

Skrivstova hansara er í Havn, men mikudagin var hann bert til arbeiðis á skrivstovuni hálvan dag.

– Hetta er stak hugnaligt, at tey koma til føroyar, sum